## HEILSANIR



**Teir tóku land**
Hvør skuldi trúð. at hesir grønlandsfarararnir eru blivir 140 ár. Tillukku við døgunum.
**Ynskja vit í Dalatrøð**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Eg elski teg.
**Heilsan Maibrit**
**PS.** Eisini ein heilsan til ommu



**Góða mamma og Gøran**
Hjartaliga tillukku á brúðleypsdegnum í dag 17. febr. í Nuuk. Vit gleða okkum til brúðleypsgildið, tá tit koma heim.
**Heilsan Brandur, Tita, Bára og Janus**



**Góði fitti abbi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag 17. febr. Eg elski teg. Muss og klemm.
**Ronja**



**Góði Súni**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 15. febr. Jesus signi framtíð tína.
**Heilsan mamma, babba, Sonny, Ása og Mary**



**Góða fitta Malan**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 17. febr.
**Ynskja mamma, babba, Bjarni, Jón, Linda, Lív og Vár**



**Dánjal Hansen, Runavík**
Góði Dánjal. Hjartaliga tillukku við 15 ára føðingardegnum tann 17. febr.
**Ynskja omma og abbi í Leirvík**

# Várframsýning hjá Suna

**Hósdagin tann 17. februar kl. 16 letur Suni F. Jacobsen upp várframsýning í Gallarínum Fríðriksvági í Vágsbotni**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Suni er ein av okkara gomlu kappum í listaheiminum.

Fyri gott hálvt hundrað árum síðani var hann ein tann fyrsti føroyingur at sýna fram á "Kunstnernes Efterårsudstilling på den Frie" í Keypmannahavn.

Í 1955 var hann við á fyrstu framsýning, sum føroyskir listamenn vóru saman um uttanlands. Hendan var eisini á "Den Frie".

Í 1961 tóku føroysku listamenninir seg saman um at sýna fram í Íslandi, og var Suni eisini við har.

Síðan hevur hann síðan verið trúfastur luttakari í framsýningum á ólavsøku og øðrum framsýningum, sum verið hava í Føroyum.

Hann er fjølbroyttur listamaður. Umframt at mála er hann yrkjari og tónleikari, og hevur hann tí ríkað okkara mentanarlív á so mangan hátt.

Hann er gøtumaður og hevur djúpar røtur í heimbygd síni, men hevur mest búð í Havn.

Hann er sera fjølbroyttur listamálari, sum bæði málar oljumálningar og teknar.

Í seinastuni hevur Suni F. Jacobsen serliga málað vatnlitismyndir (akvarellir), og á hesi framsýning eru rættiliga nógvar av teimum, hann hevur málað síðstu árini. Innan hesa listagrein er hann ein av teimum fremstu vit hava í Føroyum.

Gallarí Fríðriksvág er opið kl. 16 til 17.30 mánadag til fríggjadag.

# 25.000 um dagin

Við fleiri enn 25.000 vitjanum um dagin er portal.fo so nógv tann mest vitjaða føroyska heimasíðan

Hetta staðfestir nýggi vevmátarin hjá Gallup Føroyar, sum nú á aðru viku sýnir yvirlit yvir vitjanir á føroyskum heimasíðum.

Enn eru tað ikki allar síður, sum eru skrásettar á almenna yvirlitinum, men tað er tó eingin ivi um, hvør síða er tann mest vitjaða.

www.olivant.fo, ella portalurin, sum síðan vanliga verður rópt, hevði seinastu viku 176.131 vitjanir. Tað eru beint omanfyri 25.000 vitjandi um dagin.

Almenni listin hjá Gallup fevnir í løtuni um 21 heimasíður.

-jm

30,- kr. Sosialurin

## Heilsanir

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**